# Fundarfrágreiðing til HSF-limafund hósdagin 1. sep 2022

Luttakandi: Gunn Ellefsen, Durita Thomsen, Høgni Vilhelmsen og Heini Ellingsgaard fyri Starvsnevndina, Inga Dahl fyri Kappingarnevndina. Ári Rouch og Mark Lausen-Marcher fyri umsitingina. Sunnuva Vesturdal fyri EB, Bjørg Paturson og Eyð Hansen fyri VÍF, Elsa Reinert fyri Neistan, Aage Arnoldsen fyri Tjaldur, Rúni Rasmussen og Egi Gothard Danielsen fyri StÍF, Anja Weyhe og Nicklas Selvig fyri KÍF, Súsanna Lydersen fyri Stjørnuna, Eyðun Mortensen og Maibritt Johannesen fyri Kyndil, Emy Sólvitsdóttir og Eyðun Joensen fyri H71, Sólja Jóanisdóttir fyri Søljuna. Sunrid í Gong og Gunnvá Eysturoy fyri ÍA. Helena Kallsberg fyri Team Klaksvík. Ikki umboðaði VB

### 1.0 Uppskot til samtyktar: Nýggjur kappingarleistur fyri Burn og SMS deildina

Ári Rouch greiddi frá uppskotinum til nýggjan kappingarleist. Ein arbeiðsbólkur við umboðum úr trimum feløgum, kappingarnevndin og umsitingin hevur arbeitt við uppskotinum, sum var sent feløgunum til hoyringar 1. juli 2022. Hugsanin handan uppskotið er, at dystirnir tíðliga í kappingini skulu hava størri týdning og at spenningur helst skal vera til endans í grundspælinum við tað at 6 lið koma í endaspælið, har nr. 1 og 2 koma beinleiðis í hálvfinalurnar, meðan nr. 3, 4, 5 og 6 spæla fjórðingsfinalur. Endaspælið fyri niðara bólkin, sum feløgini ikki hava havt serliga stóaran áhugað í, fellur burtur.

Freistin at gera viðmerkingar var 7. august. HSF hevði ikki fingið nakrar ítøkiliga viðmerkingar, annað enn at feløg taka undir við broytingaruppskotinum.

### 1.1 Niðurstøða
Feløgini tóku undir við nýggja kappingarleistinum og verða dagførdar reglur lagdar á heimasíðuna.

### 2.0 Uppskot til samtyktar: Nýggjur kappingarleistur hjá U10
Ári Rouch greiddi frá uppskotinum til nýggjan kappingarleist hjá U10, har liðini spæla sonevnda fyrireikingarkapping fyri jól, har stigini ikki telja í mun til nakað FM-heitið. Eftir jól ger kappingarnevndin, í samráð við feløgini, uppskot til upp- og niðurrykking í bólkunum. Hareftir verður leikt um FM og kappast verður um steyp og medaljur í ymsu bólkunum.

Ein arbeiðsbólkur við umboðum úr trimum feløgum, kappingarnevndini og umsitingin hava arbeitt við uppskotinum, sum var sent feløgunum til hoyringar 1. juli. Freistin at gera viðmerkingar var 7. august. HSF hevði ikki fingið nakrar ítøkiliga viðmerkingar, annað enn at feløg taka undir við broytingaruppskotinum.

### 2.1 Niðurstøða
Feløgini tóku undir við nýggja kappingarleistinum og verða dagførdar reglur lagdar á heimasíðuna.

### 3.0 Fyriskipan av steypakappingini hjá teimum vaksnu
Tá leisturin fyri landskappingina nú verður broyttur, krevur hetta eisini tillagingar í leistinum fyri steypakappingina hjá teimum vaksnu. Hetta er eisini í mun til, at tað nú eru 8 lið í bestu kvinnudeildini.

Høvuðbroytingarnar eru, at bólkarnir í steypakappingini nú verða gjørdir eftir endaligu støðuni í grundspælinum landskappingini kappingarárið fyri. Hetta tí at umførini í bólkaspælinum nú liggja ávikavist, fyrst í oktober, annað í november, triðja í desember, hareftir at hálvfinalur og finalur liggja í februar.

Fundurin umrøddi, hvat tal av liðum var hóskandi til bólkaspælið. Eisini hvørt feløg enn skulu kunna luttaka við fleiri liðum vaksnamannaliðum í somu steypakapping.

Arbeiðsbólkurin hevur skotið upp, at tá tað eru 7 lið í fremstu deildini, kunnu upp til 8 lið luttaka í bólkaspælinum og eru 8 lið í fremstu deildini, kunnu upp til 10 lið luttaka í bólkaspælinum. Kappingarstjórin mælti til hetta, fyrst og fremst út frá praktiskum orsøkum í mun til núverandi talið av liðum í mans- og kvinnudeildini og í mun til møguliga vavi av samlaðu kappingini.

**3.1 Niðurstøðua**
Feløgini tóku undir við tilmæltu tillagingunum í kappingarskipanini, herundir at feløg skuldi hava møguleikan at melda fleiri vaksnamannalið til.

**4.0 Fyriskipan av steypakappingini hjá børnum (strika b-kapping hja U16)**
Ári Rouch legði fram broytingaruppskot fyri steypakappingina hjá børnum, har skotið var upp, at strika b-kappingina hjá U16. Tað eru bert b-kappingarnar hjá U10, U12 og U14, sum eru partur av finaludegnum á Hálsi og hevur áhugin fyri b-kappingini hjá U16 verið lítil. Broytingin skal eisini síggjast í mun til, at talið av tilmeldingum í U16 vanliga er lægri enn í mun til U14 og niðureftir.

Fundurin umrøddi málið og staðfesti, at talið av liðum í U16 kann variera nógv millum ár og kann ein møgulig b-kapping í U16 geva meining, um talið av liðum er høgt.

**4.1 Niðurstøða**
Tað var samtykt, at umsitingin skal senda feløgunum fyrispurning, hvørt tey vóru áhugaði í einari b-kapping í U16 eisini, og at feløgini síðani umrøða hetta saman við teirra venjarum og síðani senda teirra viðmerkingar inn. HSF kann hereftir taka støðu til málið

**5.0 Broyting av kappingarreglu 6.15 (strika útvallarfyrimun)**
Skotið var upp at strika fyrimunin við útivallarmálum í cup dystum. Hetta er í føroyskum føri bert aktuelt fyri hálvfinalurnar í steypakappinin hjá teimum vaksnu, har liðini leika ein úti- og ein heimadyst. Ásetingin er strikað í altjóða reglum, t.d. Europa Cup dystum hjá EHF.

**5.1 Niðurstøða**
Uppskotið var samtykt.

**6.0 Útlendingamarkið á tríggjar leikarar, reglur og møgulig undantaksloyvi**
Feløg hava vent sær til HSF í summar í mun til útlendingaloftið á tríggjar leikarar. Fyri kappingarárið 2020-21 samtykti limafundur, at StÍF kundu hava 4 navngivnar útlendingar ta kappingarárið. Til kappingarárið 2022-23 hevur HSF fingið ítøkiligar umsóknir frá Team Klaksvík og Stjørnuni um 4 útlendingar.

StÍF hevði eisini sent inn uppskot um at í fyrstu atløgu hækka loftið til 4 útlendskar leikarar ella í aðru atløgu at einki loft er.

Fundurin umrøddi, hvørt haldast skuldi fast við verandi tal á í mesta lagi tríggjar útlendingar, hækka talið til 4, uppheva loftið ella geva navngivin undantaksloyvi til konkretu umbønirnar.

Feløgini vóru ymisk á máli, hvar markið skuldi setast.

Ført var fram, at tað skuldi verið nakrar meginreglur um, hvussu og nær tú kanst fáa undantasloyvi til 4. leikaran og at mark skuldi vera til nær í kappingarárinum tú kanst søkja.

**6.1 Niðurstøða**
Meiriluti var fyri at halda fast við verandi tal á í mesta lagi tríggjar útlendingar, men at játta Team Klaksvík og Stjørnuni undantaksloyvi til 4 navngivnar leikarar, galdandi fyri kappingarárið 2022-23. Hartil skal HSF gera uppskot til viðgeraðarreglur í mun til tílíkar umsóknir.

**7.0 Hallarviðurskifti – nýggjur miðsirkul, stuttvøllur**
Ári Rouch kunnaði um nýggju regluna í mun til uppgevarakast, sum nú krevur at ein miðsirkul á 4m í tvørmáti er í høllini. Hallarumsitingarnar hava fingið boð um at fáa hetta í lag. Hartil kunnaði Mark Lausen-Marcher um at royndirnar við stuttvølli halda fram og at c- og d bólkurin í U10 skal spæla landskappingardystir á stuttvølli í vetur. Mark hevur kunnað hallarumsitingarnar um hetta.

**7.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur

**8.0 Ymisk kunning**
Ári Rouch kunnaði um talgildu heildarskipanina og at allir dystir nú skuldi avgreiðast við iPaddi hallunum.

**8.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur

**Fundarskrivari:**
Ári Rouch